# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*20. januar fekk Helena eina lítla systir. Hon vigaði 4200 gr. og var 55 cm long. Foreldur okkara eru Kristina V. og Niklái Nysted.*

14. januar fingu Mai-Britt Kjærbo og Róaldur Jákupsson, Hoyvík, eina dóttur. Hon vigaði 3900 gr og var 55 cm long.

19. januar fingu Sóleyð og Niels Pauli Nielsen, Hvalba ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4400 gr.

20. januar fingu Elsebeth og Ottar á Lofti, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4270 gr.

21. januar fingu Rannvá H. Dam og Bogi Dam, Argjum, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2060 gr.

22. januar fingu Gunnvá Wardum og Jógvan Kristiansson Glerfoss, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3750 gr.

22. januar fingu Leona og Kári Nilssen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

24. januar fingu Gunnvá S. á Lofti og Jens Kristian Haraldsen, Miðvági, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3400 gr.

25. januar fingu Annetta og Jóhan Andrias Hansen, Runavík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4320 gr.

## Andlát

20. januar
Hjørdis Christiansen, í Havn, fødd Lamhauge, ættað úr Rituvík, 77 ár

21. januar
Oliver Olsen, Klaksvík, vanliga nevndur Oliver á Geilini, ættaður úr Svínoy, 79 ár.
Kirstin J. Hellesoy, ættað úr Miðvági, búsitandi í Norra, 80 ár.
Brynhild Niclassen, Hestur, fødd Midjord úr Havn, 75 ár
Marna Jensen, fødd mortensen, ættað úr Trongisvági, búsitandi í Odense, 70 ár.

22. januar
Paula Holm Joensen, Vágur, 90 ár.

24. januar
Marita Weihe, Tórshavn, 56 ár.
Elisa Fredrikka Lamhauge úr Kollafirði, 62 ár.
Kjartan Hansen, vanliga nevndur Kjartan í Garðinum, Klaksvík, 66 ár.

25. januar
Ninni á Lofti úr Sandavági.

26. januar
Gunnleiv Hansen, Tórshavn, 72 ár.

# Ebba Petersen 90 ár

Í sekstiárunum komu viðhvørt boð frá Kvinnufelagnum í Havn um, at nú skuldi Mettustova tjørast og málast. So varð farið til verka. Havnin kann á sumri viðhvørt hava yvir sær ein næstan gandakendan hugna, ikki minst tá eitt fleyr av pollamjørka sveipir hús og gøtur inn í sítt dovisliga slør. Undir Høgareyni kom ein í prát við grannarnar, sum tá búðu har, eitt nú Eyvind Mohr og Ninu, sum tá áttu smá børn, og ta blíðu Janu, sum búði har Kristian Blak og Sharon Weiss nú búgva. Hóast hesin gamli býlingur hevði eina atmosferu, sum væl sansaðist, visti ein tá lítið um Mettustovu, har Edward Mitens búði um 1900, tá hann fór at ganga í realskúla, og har abbasystrar hansara - systrarnar Effersøe - seldu mansjettir, sjokulátu og mandlustengur.

Tað var sjálvandi Ebbamostir, sum kom við áheitan um at mála Mettustovu. Síðani tá eru nakrir laggardropar runnir í havið, og nú sunnudagin verður Ebba Petersen, fødd Kamban, 90 ár. Ebba er dóttir Hanus Kamban, lærara úr Skúgvi, og Mariu Ziska úr Havn. Tey vóru sjey systkin, og Ebba var tann fimta í systkinaflokkinum. Í dag eru trý á lívi - umframt Ebbu eisini Janus Kamban, myndahøggari, og Hjørdis Djurhuus, sum fyri stuttum var at hoyra í Útvarpi Føroya í sera áhugaverdari samrøðu.

Hjá okkum, sum í fimtiárunum búðu á útoyggj, var tað altíð sum eitt ævintýr at koma til Havnar at ferðast, vanliga á sumri. Úr bakaríunum stóð ein lystiligur angi, og handan sýnisgluggar við tølandi gulari glæmu sóust vøkur ur, knívar, sum kundu fáa dreingjaeygu at glógva, ella stásilig modellskip. Yviri á Kák stóðu neystini enn, og einki var sprongt burtur av lendinum undir Skansavegi og Yviri í Trøð. Skjótt var at ganga av bryggjuni eftir gøtuni niðan á Krákustein. Høgrumegin sóu vit tá húsini hjá VBV, har Studentaskúlin tá helt til, og har ein onkuntíð sá Erik Petersen, Eirik, sum vit róptu hann - sum undirvísti har í føroyskum og donskum - í ferð við at reka sínar næmingar niðan ígjøgnum ta lítlu trappuna aftan á fríkorterið. Á Krákusteini heilsaði ein upp á skyldkonuna Elspu Helenu (hennara hús standa enn og eru friðað), og nøkur fet seinni rendi ein seg í beiggja hennara, tann heldur álvarsama Sørin á Krákusteini. Komnir yvir í Jónas Broncksgøtu fingu vit - meðan omma enn livdi - straks nøkur oyru, so vit kundu fara oman í ta lítlu bakaríútsøluna hinumegin gøtuna og keypa eina 10-oyrakaku. Henda fýrakantaða kakan, við róma og einum minni fýrakantaðum toppi av reyðum sjelé ella súltutoyi ovast, vigaði væl og virðiliga upp ímóti tí sjóverki, sum ein ferð um Skopunarfjørð við Dúgvuni, seinni Rituni, ofta hevði við sær.

Um hetta mundið, í fyrru helvt av 50-árunum, settu Ebba og



Eirikur við familjuni búgv uppi undir Varða. Framskygd munnu tey hava verið, tí húsini, tey lótu byggja, í tveimum hæddum, eru stór, eisini eftir nútíðar máli. Vit ungu sluppu at vera við í tí seinasta arbeiðinum, eitt nú til at blanda við hond sementið, sum fór í tann høga garðin rundan um tann stóra urtagarðin.

Um hetta mundið gistu vit ofta uppi undir Varða í summarfrítíðini. Munurin millum bygd og bý var tá nógv størri enn í dag. At koma av útoyggj, har seinnapartarnir eftir skúlatíð vanliga fóru til at saksa, bera tøð, leita eftir reka osfr., og inn í húsini undir Varða var næstan sum at koma í kongsins borg. Serligan ans vaktu fýra trølsliga ógvisligir málningar - av fýra monnum, sum allir høvdu stóra nøs, og har teir tríggir bóru hvítar parúkkar - sum hingu vinstrumegin beint innan fyri hurðina í tí stóru, avlongu stovuni. Hetta vóru sjálvandi tónaskaldini Beethoven, Bach, Haydn og Couperin, soleiðis sum William Heinesen hevur avmyndað teir. Serliga Beethoven, við svartari meis og grimum, í støðum næstan sótsvørtum, samanryktum andliti, kundi fáa ein smádrong - sum ongantíð hevði sæð eina málningaframsýning - hvøkka við.

Eirikur undirvísti sum nevnt í máli og bókmentum á Studentaskúlanum. Men hann var umframt tað kreativur maður við mongum áhugamálum, violinleikari, maskinsnikkari, fotografur, filmsmaður og violinbyggjari.

Ebba var okkum ein góð mostir, blíð, barngóð, skemtingarsom og stuttlig. Onkuntíð hildu vit jól uppi undir Varða, og standandi framman fyri tí ovurstóra stovuvindeyganum upplivdi ein nýggjársaftan at síggja fimtiáranna fýrverk prýða himmalin yvir Havnini við sínum marglittu snyrlandi kalligrafisku mynstrum.

Men allarmest er tað sumrini, ein minnist aftur á, ferðirnar til gongu út á Fiskasentralin at keypa døgurðamat og fyrst og fremst útferðirnar upp um fjallið og oman í Havnardal. Útgjørdir við matpakka hildu vit avstað, og so gekk ofta allur dagurin við at ganga fram við ánni, spæla og svimja í teimum djúparu hyljunum. Gott var at koma aftur um kvøldið, Ebbamostir hevði (og hevur) ein ans fyri tí stuttliga í tilveruni, sum gjørdi tað festligt at vera saman við henni. Eitt sum eg ongantíð gloymi er, at vit uppi undir Varða fingu - umframt morgunmat, døgurða og nátturða - eisini eina fjórðu máltíð - millummála! Slíkt var ókent í okkara heimi, og ein mungandi bygdadrongur mátti sanna, at Havnin var eitt gott stað at búgva í, og at sumt av tí, sum fólk her høvdu uppfunnið, ikki var so býtt. Annars var umhvørvið uppi undir Varða tá ofta bæði lívligt og hendingaríkt, tí á stykkinum uttan fyri og oman fyri húsini hjá Johannes Wardum komu børn saman til spæl, ikki bara úr grannalagnum, men eisini úr øðrum býarpørtum.

Sum tær mongu framsýningarnar vísa, er tað merkisvert, hvussu nógv frítíðarvirksemi fólk í Føroyum takast við, og har ikki minst konufólkini. Ebba hevur, eins og mamma og omma hennara, altíð havt stóran áhuga fyri at virka pløgg og annað úr ull. Litsansin hevur hon góðan, hugflogið er vítt og fevnir eisini um tað skemtiliga í tilveruni, alt hetta saman við góðum handalag hevur gjørt hana til eina dugnaliga og kynstruga vevkonu. Ebba dugir eisini væl at siga frá, eitt gott dømi um hetta er grein, hon hevði í einum blað fyri o.u. tjúgu árum síðani um Onnu Sofíu á Rípini í Skúgvi. Anna Sofía var merkiskvinna, hevði verið á háskúla og eigur ein sálm í sálmabókini. Í síni grein greiðir Ebba ógvuliga livandi frá tí vetrinum, Anna Sofía - eftir umbøn frá Jóannesi bónda - var og vav í Kirkjubø.

Ebba var við í Kvinnufelagnum, frá tí felagið varð stovnað í 1952. Hon sat sum forkvinna í eitt ár, var í mong ár stjórnarlimur og tók annars, saman við Sigrið av Skarði, Jóhonnu Jensen og mongum øðrum kvinnum, sum tá vóru í vælmaktini, lut í felagsarbeiðinum. Eitt av teimum stóru tøkunum hesi árini var at seta Mettustovu í stand. Húsini vóru so illa farin, at, sum Ebba skrivar einastaðni, tá farið varð oman hagar, var "ikki nokk at vera í regnklæðum, paraply mátti eisini havast við". Men arbeiðið helt fram, innsavningar, eydnuhjól og burturlutingar vóru við til at útvega pengar, og í 1961 høvdu kvinnurnar sín fyrsta fund í Mettustovu. Í dag eru húsini eitt prýði fyri ta gomlu Havnina.

Hjartaliga tillukku við degnum.

**Hanus**